Pappírsketa við jólanissum

Klipp eina pappírsál til hvønn næming.
Pappírið kann t.d. vera reytt á liti.




Álin kann vera 8-12 cm breið og 50-80 cm long.


Tilfarið kann t.d. vera glanspappír, jólapappír, kartong ella annað.

Er bara litað A4-pappír til taks, kann tað eisini verða brúkt. Klipp pappírið í helvt eftir longdini og líma saman. Á tann hátt fæst ein ál, sum er um 10 cm x 60 cm.

Boygg pappírsálina sum víst í líka stór petti. Tú kant t.d. boyggja eitt petti og so boyggja hini pettini eftir hesum. Endapettið kanst tú klippa burtur, passar tað ikki inn í heildina.



Legg nú pettini (t.d. 6 ella 8 í tali) saman og tekna eitthvørt skap á samanløgdu pettini, t.d. eina jólanissu og klipp út sum myndin vísir.



Ansast skal eftir, at pappírið ikki verður klipt heilt av, har sum boygt verður. Á myndini hanga nissurnar t.d. saman bæði á hondum og fótum. Tað er ein fyrimunur.

